Krevur 80.000 krónur fyri at flyta skúlabørn til og úr Suðuroy

– Strandferðslan setir so stór, peningalig krøv, at tað verður ómøguligt at halda skúlaítróttardag nakra aðrastaðni, enn í Havn, sigur formaðurin í ítróttarlærarafelagnum

SKÚLAÍTRÓTTUR
Áki Bertholdsen

Skúlaítróttardagurin, sum skuldi verða í Suðuroynni mikudagin 6. juni, er nú avlýstur.

Orsøkin er, at Strandferðslan hevur sett so hørð krøv, at tað ber snøgt sagt ikki til at hava dagin.

Skúlaítróttardagurin er fyri børnini í 6. flokki í øllum Føroyum.

Fyrireikararnir í Suðuroynni hava arbeitt leingi við at fyrireika dagin fyri teimum 600 børnunum, sum tilsamans manna sættu flokkarnar kring landið.

Ætlanin er at hava ítróttardagin bæði í Vági og á Tvøroyri, so at 300 børn eru á hvørjum staði.

Aftur í ár er skúlaítróttardagurin avlýstur og helst dettur tiltakið heilt niðurfyri, tí at Strandsferðslan er farin at senda eykarokningar fyri at flyta næmingarnar aftur og fram

Sum vant, er tað Strandferðslan, sum tekur sær av at flyta næmingarnar úr øllum Føroyum til og frá ítróttardegnum.

Men nú hevur Strandferðslan sett fyrireikarunum so harðar treytir fyri at taka sær av hesum flutninginum, at tey hava gjørt av at avlýsa dagin.

Strandferðslan vísir á, at túrurin til Suðuroyar kostar Strandferðsluni pening.

– Tí heldur Strandferðslan tað vera rætt at tryggja sær eina ávísa upphædd fyri at flyta næmingarnar frá teimum ymsu skúlunum, til og úr Suðuroynni. Mett verður, at 80.000 krónur er minsta mark fyri at flyta næmingarnar um alt landið, stendur í skrivi, sum fyrireikararnir have fingið frá almenna flutningsfelagnum.

Aldrin fyrr

Tey, sum hava fyrireikað ítróttardagin siga, at hetta var sum at fáa eina kalda pøs í høvdið.

– Hetta eru treytir, sum vit ongan møguleika hava at eftirlíka, sigur Karin Maria Thorsteinsson, lærari á Tvøroyri, sum er ein av fyrireikarunum.

Tí hava tey nú gjørt av at avlýsa dagin.

Hon heldur, at hetta er ómetaliga spell, at hetta skal vera komið upp nú, tí hetta er eitt tiltak, sum bara er fyri sættu flokkarnar og tí er tað bara einaferð í lívinum, at børnini fáa hetta upplivilsið.

– Hetta hendur í teimum døgum, táið so nógv verður tosað um økismenning og útjaðarapolitikk. Men hetta er so bara eitt prógvum, at táið tað kemur til stykkis, er hetta tann beri orðaskvaldur.

Torfinn Højgaard, sum er formaður í Ítróttarlærarafelag sigur, at hetta hava tey aldrin verið úti fyri fyrr frá Strandferðsluni.

– Vit hava havt ítróttardag síðani 1989 og Strandferðslan hevur altíð tikið sær av flutninginum. Teir ymsu partarnir í landinum hava skiftst um at skipa fyri degnum, men vit hava ongantíð áður fingið eykarokning fyri flutningin, sigur hann.

Hann sigur, at verður hetta mannagongdin, dettur hetta tiltakið helst niðurfyri - í hvussu so er, fer tað ikki at bera til at skipa fyri ítróttardegi aftur nakrastaðni uttanfyri Havnina.

– Hetta er einasta felags tiltak, sum fólkaskúlin hevur, og alt arbeiðið, sum verður lagt í tað, er sjálvboðið og ókeypis. Tað mesta, vit kunnu vænta at fáa til dagin, eru einar 10.000 krónur frá Undirvísingar og Mentamálastýrinum til beinleiðis útreiðslur av tiltakinum, eitt nú til at keypa útgerð og vørur fyri. So at krevja eyka pening frá okkum fyri at at flyta næmingarnar aftur og fram, er tað sama sum at avhøvda tiltakið, sigur Torfinn Højgaard.

Standardline Miditower
P130-31-L
Pentium 4 1,3 GHz Geril • 128 MB RDRAM PC600 • 40 GB harddisk • 32MB nVidia Geforce2 MX grafikkort v/TV out • 12xDVD drev við forritum, disklastað, 16 bit integreað ljóðkort, standard hátalari • 56K internt DATA/FAX riser modem • Microsoft Windows MILLENIUM DK • Microsoft Works Suite 2000*: Word 2000, Works 2000, Encarta World Atlas 2000, Picture it! 2000, Autoroute Express 2000 • Microsoft spæl • Standard knappaborð • Wheel mús • 1 ára garanti • 17" skermur
Kr. 18.495,-
FUJITSU SIEMENS
FÍGGING, DØMI:
Útgjald: 6.165
Rest yvir 12 mór.:
1.139 um. mán.
Rest yvir 18 mór.:
789 um. mán.
3ari ELECTRONIC
SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo

Vit mugu fáa roknistykkið at ganga upp

Tað er ein misskiljing, at tey, sum skipa fyri ítróttardegnum skulu betala 80.000 krónur. Men talan er um serflutning og hann er dýrur, sigur Strandferðslustjórin

SKÚLAÍTRÓTTUR
Áki Bertholdsen

– Tey, sum skipa fyri skúlaítróttardegnum, skulu ikki betala 80.000 krónur. Men tað er dýrt at flyta børnini til og frá, so nakað skal betalast.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at Strandferðslan kann ikki gera seg sjálva til eitt sjálvtøkuborð, har fólk kunnu fáa serflutning til hetta ella hitt.

– Vit hava eina ógvuliga tronga fíggjarætlan og hon er lødd eftir teirri ferðaætlan, vit hava. Skulu vit so haraftur taka okkum av serflutningi av ymsum slagi fyri einki, standa vit eftir við einum undirskoti við ársenda, sum vit so mugu biðja landskassan um eykajáttan til.

Tað er eitt prinsipp, at vit vit ikki flyta 600 skúlabørn úr øllum landinum til ítróttardag á Tvøroyri og í Vági, uttan at fígging fylgir við, tí annars fáa vit ikki fíggjarætlanina at halda, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni

Reidar Nónfjall sigur, at Strandferðslan tí er farin at herða treytirnar fyri serflutning av ymsum slagi. Tað ber í sær, at undirskotið av flutninginum skal fíggjast onkusvegna fyri at stovnurin skal fáa hildið fíggjarætlanina, sum hann hevur skyldu til.

Strandferðslustjórin sigur, at tað má metast at vera serflutningur, at flyta 600 skúlabørn úr øllum úr øllum landinum til Vágs og til Tvøroyrar til skúlaítróttardag.

– Hetta liggur uttanfyri ferðaætlanina og á vanligu fíggjarætlanini seta vit ikki pening av til serflutning. Hetta er tí eisini ein spurningur um eitt prinsipp um, at vit eiga ikki at gjalda fyri serflutning, sum liggur uttanfyri ferðaætlanina.

Hann sigur, at soleiðis sum brævið frá Strandferðsluni til fyrireikararnar er orðað, er lætt at skilja tað soleiðis, at rokningin fyri hendan serflutningin er 80.000 krónur.

– Hetta er ikki so, men brævið skuldi verið orðað øðrvísi og tað er eitt mistak, sum vit mugu taka á okkum.

Brævið frá Strandferðsluni skal skiljast so, at tað kostar 80.000 tilsamans at taka sær av at flyta børnini til og frá ítróttardegnum. Hinvegin betala børnini ferðaseðlar, so nakað av inntøku er eisini. Men talan verður í øllum førum um eitt undirskot og millumrokningin, sum er munurin ímillum inntøkurnar og útreiðslurnar, skal so fíggjast onkusvegna.

Upp á standandi fót dugdi hann ikki at meta um, hvussu stór hendan eykarokningin fór at vera.

Karin Maria Thorsteinsson, sum er ein av fyrireikarunum á Tvøroyri, sigur, at Daniel P. Lamhauge, ferðslusamskipari hjá Strandferðsluni, hevur síðani upplýst, at millumrokningin í sambandi við ítróttardagin verður onkustaðni ímillum 20.000 krónur og 30.000 krónur, sum fígging so skal finnast til.

– Tað ger tað sama um talan er um 20.000 krónur, ella um 80.000 krónur. Vit fáa onki gjørt við tað og sostatt stendur tað fast, at skúlaítróttardagurin í ár er avlýstur, sigur hon

Í fjør var hann eisini avlýstur. Tá var tað tí, at lærarnir sjálvir vóru í verkfalli.

Sjónvarpið fær nýggjan stjóra

Mentamálastýrið søkir nú eftir nýggjum stjóra til Sjónvarp Føroya. Stjórin verður settur 1. august í ár

STJÓRASTARV
John Johannessen

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, fer fyrsta august í ár at seta nýggjan stjóra fyri Sjónvarp Føroya.

Síðani Tróndur Djurhuus segði seg úr stjórasessinum fyri Sjónvarpið, hevur útvarpsstjórin, Jógvan Jespersen, verið stjóri fyri báðar almennu loftmiðlarnar.

Sum stjóri fyri Sjónvarp Føroya hevur tú ábyrgdina av dagligu leiðsluni av stovninum. Tað er stjórin, ið setur starvsfólkið, eins og hann hevur fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum mótvegis landsstýrismanninum í mentamálum.

Mentamálastýrið ger í tíðindaskrivi og í starvslýsingum í blaðunum greitt, at av umsøkjarunum krevst útbúgving frá lærdum háskúla ella onnur viðkomandi útbúgving, leiðsluroyndir frá almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum, góð samstarvsevni og mennandi leiðslustílur. Harumframt krevst kunnleiki til føroyska mentan og føroyskt mentanarlív.

Sjónvarpið skal nevniliga mótvegis borgarunum senda sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Stovnurin skal í programmvirkseminum leggja dent á upplýsing, talufrælsi og sakliga og óhefta upplýsing. Eisini er álagt Sjónvarpinum at veita eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.

Umsóknarfreistin er 18. juni. Sum sjónvarpsstjóri verður tú løntur eftir 37. lønarflokki hjá tænastumonnum. Starvið er kortini ikki tænastumannastarv.

1. august í ár fer landsstýrismaðurin í mentamálum at seta nýggjan stjóra fyri Sjónvarp Føroya

Politiskar markeringar vorðnar vani

Málið um Postverki Føroya verður nú nýtt til politiskar markeringar úr hvør sínum leiri í samgonguni. Slíkar útmeldingar eru farnar at eyðkenna samgonguna

EYGLEIÐING
John Johannessen

Markeringar frá hvør sínum veingi í samgonguni er nakað, sum síðani hørðu samgongustríðini er farið at eyðkenna samgongustevnið. Hetta er eisini galdandi fyri málið um at dagføra Posverk Føroya.

Uppskotið hjá Bjarna Djurholm um postvirksemi er eitt uppskot til eina generella lóg um postvirksemi í Føroyum. Sum so hevur uppskotið lílta ávirkan á, um sjálvt Postverkið verður dagført ella ikki.

Men fyri stuttum hevur landsstýrismaðurin við ábyrgdini fyri Postverkið alment gjørt greitt, at avleiðingin av, at uppskotið ikki varð samtykt hesa tingsetuna er, at Postverkið ikki verður dagført, og at tað fer at merkja uppsagnir og verri tænastustøði. Skuldina hevur hann í fjølmiðlunum givið Tjóðveldisflokkinum.

Síðani er Tjóðveldisflokkurin komin við almennum viðmerkingum um, at Postverkið sjálvsagt verður dagført, og at semjan um at dagføra tað stendur við. Harafturat hevur hann átalað, at Bjarni Djurholm tosar um, at tað helst verður neyðugt við uppsagnum innan Postverkið.

Alt hetta bendir á, at politikarar og politiskir flokkar í samgonguni í størri mun nýta vánaligu støðuna hjá Postverkinum til at markera seg politikst, enn at finna saman um, hvussu Postverkið kann dagførast.

Orsøkin er helst, at Tjóðveldisflokkurin á vinstraveinginum og Fólkaflokkurin á høgraveinginum hava heilt hvør sína hugsan um, hvussu betrast kann um Postverk Føroya. Og orsakað av vánaliga stevinum í samgonguni, melda flokkarnir út hvør í sínum lag, í staðin fyri at finna eina hóskandi loysn innanhýsis í samgonguni.

Bjarni Djurholm má takka sínum egna flokki fyri, at lógaruppskotið um postvirksemi ikki varð avgreitt í hesi tingsetuni.

Hetta vísir Heni O. Heinesen, formaður í vinnunevndini á, eftir at Bjarni Djurholm alment hevur skuldsett Tjóðveldisflokkin fyri at súltað málið við teirri avleiðing, at Postverkið ikki verður endurnýggjað.

– Tað, sum hendi í vinnunevndini var, at ávísir limir í Fólkaflokkinum ikki kundu taka undir við uppskotinum, tí posthús skuldu leggjast niður. Fólkaflokkurin var ímóti uppskotinum hjá Bjarna Djurholm, tí kom einki álit í tingið, ger Heini O. Heinesen greitt.

Rossahandil

Sosialurin skilir frá Heina O. Heinesen, at tað var Jógvan á Lakjuni úr Fólkaflokkinum, sum var heitastur fyri at súlta uppskotið hjá sínum egna partamanni.

Jógvan á Lakjuni er formaður í mentanarnevndini. Og har lá eitt uppskot, hann fegin vildi hava súltað. Talan var nevniliga um uppskotið hjá Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismanni í mentamálum, um broytingar í kringvarpslógini.

Landsgranskoðarin var komin við viðmerkingum til hetta uppskot, ið sáddu iva, um tað var rætt at samtykkja tað.

Tí vildi Jógvan á Lakjuni hava uppskotið til kringvarpslógina súltað til næstu tingsetu. Og fyri at fáa undirtøku fyri hesum frá øðrum limum í mentanarnevndini, gjørdi hann eina avtalu um, at hann skuldi vera við til at súltað uppskotið í vinnunevndini um postvirksemi hjá partamanninum.

Formaðurin í Vinnunevndini:

Fólkaflokkurin steðgaði Postmálinum

Orsøkin til, at lógaruppskotið um postflutning ikki kom úr aftur vinnunevndini áðrenn tingsetandi endaði var sambært formanni nevndarinnar, at umboðini hjá Fólkaflokkinum súltaðu tað

POSTVERKIÐ
John Johannessen

Standardline Miditower
AMD ATHLON 1 GHz Geril
128 MB SDRAM PC133 • 20 GB harddisk • Brennari 8x8x32 • 32MB ATI Xpert 2000 Pro AGP grafikkort • 12xDVD drev við forritum, disklastað, 16 bit integreað ljóðkort, standard hátalari • 56K internt DATA/FAX riser modem • Microsoft Windows MILLENIUM DK • Microsoft Works Suite 2000*: Word 2000, Works 2000, Encarta World Atlas 2000, Picture it! 2000, Autoroute Express 2000 • Microsoft spæl • Standard knappaborð • Wheel mús • 1 ára garanti • 17" skermur
FUJITSU SIEMENS
Kr. 16.495,-
FÍGGING, DØMI:
Útgjald: 5.499
Rest yvir 12 mór.:
1.019 um. mán.
Rest yvir 18 mór.:
706 um. mán.
3ari ELECTRONIC
SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo

Internet Sosialur in
www.sosialurin.fo

Opið er til kl. 15.00
Leygardagin
Kanón tilboð
Ruskins jakkar
áður: 1.298,-
Nú: 699,-
mótasKálin